# Kommununurnar størri ábyrgd?

JÓGVAN PHILBROW
Nevndarlimur í Føroya pedagogfelag



Fleiri uppgávur út til kommununurnar er niðurlagið, sum um hetta er trygdin fyri at borgarin fær eina betri tænastu. Men veruleikin er ikki so einfaldur.

Dagstovnaøkið varð lagt út til kommununurnar at umsita í 2000, eingin verulig eftirmeting er gjørd av, hvussu hetta hevur hepnast. Ja, fleiri stovnar eru settir á stovn, og flest allar kommunur bjóða stovnspláss, men tað er sera misjavnt, hvussu góðskan er runt um í landinum. Var tað ætlanin?

Verður hugt eftir, hvussu hesir dagstovnar húsast, er stórur munur millum tær kommunur, ið eru væl fyri og tær sum ikki eru. Onkrir stovnar eru í vánaligum bygningum sum als ikki hóska til endamálið – onkrir uttan kravdu loyvini frá myndugleikum, arbeiðseftirlit, brúnaumsjón og landslækna. Eitt er at eftirlitsmyndugleikin ikki hevur havt áhugan ella orkuna at gjøgnumført hetta eftirliti, soleiðis at børn og starvsfólk fáa virðulig kor at virka undir, nakað heilt annað er raðfestingin úti í kommununum. Alt er ikki so ljósareytt.

Seinastu árini hevur landið fingið eygað á, at børn eisini mennast áðrenn tey fara í skúla. Hetta hevur so viðført, at landið leggur alsamt fleir krøv út á dagstovnarnar. Fyrst við at flyta børn við serligum tørvi út til kommununnar, so við menningarætlanum og skjótt við námsætlanum. Hetta er ein jalig gongd, í so máta, ein viðurkenning av at tey fyrstu 7 árini eisini hava týdning, men samstundis er einki gjørt fyri at bøta um viðurskiftini hjá teimum ið starvast á økinum.

**Kommununurnar blunda!**
Kommununnar hava fingið størri ábyrgd fyri innihaldinum á dagstovnunum, men tykjast ikki vilja viðurkenna hesa ábyrgd. Flestu stovnar hava eitt "minstamark" av starvsfólkum á staðnum, ein formil ið var stungin út í korti fyrst í 90'unum tá ið landið var í djúpastu kreppu, og hava ikki verið sinnaðir at hækka hetta tal, nú dagstovnarnir hava fleiri og størri uppgávur.

Námsfrøðingar ið starvast innan dagstovnaøki hava rópt í fleiri ár um manglandi tímar til at fyrireika sítt pedagogiska virksemi, men hetta tykist eingin at hoyra. Tað ber ikki til áhaldandi at krevja, at starvsfólk skulu samstarva til høgru og vinstru, veita eitt málrættað pedagogiskt tilboð til børnini uttan at fleiri tímar fylgja við. Her eru tvinnir kostir – antin verður pedagogiska arbeiði slept ella mugu starvsfólkini "forsøma" børnini í størri mun. T.v.s. minni tíð saman við børnunum.

Spurningurin er um kommununurnar yvirhøvur eru áhugaðir í góðskuni á sínum dagstovnum – tær vilja bara "reypa" við hvussu nógv tilboð tey hava. So ein eftirmeting hevði nokk víst at fleiri dagstovnar eru komnir seinastu árini, meðan kommununurnar lítið ella einki hava gjørt fyri at bøta um góðskuna.

# Kommunalur roknskaparreformur í óðum verkum

KOMMUNUSAMSKIPAN FØROYA
www.ksf.fo

Landsstýrið og kommununnar hava í felag fyrireikað eina grundleggjandi reform av kommunala roknskaparhaldinum. Høvuðsendamálið er at skapa størri gjøgnumskygni í kommunalu fíggjarviðurskiftini.

KSF fegnast um henda týdningarmikla reform, sum fer at geva kommununum fleiri og betri fíggjarstýringsmøguleikar. Kommununnar hava tí eisini tikið virknan lut í fyrireikingararbeiðinum.

Eftir ætlan fer landsstýrið í næstu viku at lýsa nýggja kunngerð, sum setir reformin í verk frá fíggjarárinum 2009 at rokna. Tíverri er reformurin als ikki klárur at seta í verk.

Ásannandi, at talan er um umfevnandi umlegging av roknskaparhaldinum, bygnaðarligum mannagongdum og skipanum úti í einstøku kommunum, varð sett sum avgerandi fortreyt, at reglugrundarlagið og teknisku loysnirnar skuldu verða lidnar í góðari tíð, so at kommununnar fingu tíð og umstøður at seta reformin í verk.

Hesum megnaði landsstýrið ikki at halda. KSF gjørdi tí longu í juni 2008 landsstýrinum púra greitt, at kommununnar hava ikki nakran møguleika at seta nýskipanina í verk frá 2009, men í fyrsta lagi 2010.

Landsstýrið tvíheldur framvegis um ætlanina, tó at enn vanta mong týðandi viðurskifti at fáa uppá pláss.

Úrslitið er, at landsstýrið í óðum verkum tvingar kommununnar undir reglur og krøv, sum tær ikki hava møguleika til at fylgja.

KSF hevur heitt á nýggja landsstýrið um fund til tess at viðgera møguleikar fyri royndarskipan, ið bæði landsstýrið og kommununnar kunnu liva við hetta fram til 2010. Enn hevur landsstýrið ikki hirt at svara.

Stýrið í KSF mótmælir harðliga óvirðiligu støðuna, ið landsstýrið trýstir allar kommununnar í. Somuleiðis heitir stýrið í KSF enn einaferð á landsstýrið um at umráða seg av nýggjum, so at kommununnar fáa neyðugu tíðina til umskipa roknskaparhaldið eftir nýggju krøvunum.

Hetta er einasti vegur fram, skal alt tað kommunala roknskaparhaldið ikki enda í ruðuleika í fleiri ár. Og hetta var so ikki endamálið við reforminum.

# Hvar bleiv nýggi tunnilin millum Hvalba og Trongivág av?

NIELS OLAF EYVINDSSON



Eg minnist so væl øll valevnini, ið bjóðaði seg fram til løgtingsvalið í januar 2008 í Suðuroynni. Tað bleiv lovað, at nú skuldi tunnil gerast millum Hvalba og Tvøroyri, men einki hoyrdist aftur frá hesum! Hvørki landsstýrið ella løgtingið geva ljóð frá sær í hesum málinum.

Mín spurningur er: Eru hvalbingar og suðuroyingar gloymdir, ella minnast tit bert til okkum, tá val verður aftur? Eitt er vist – hendir einki nú, so kunnu tit gloyma at koma aftur við gyltum lyftum.

Søgan um okkara tunnil er nakað soleiðis. Hann læt upp fyri ferðslu í 1963 og er 1450 metur langur. Eittsporaður og við nøkrum smáum vánaligum steðgistøðum inni í tunlinum. Elsti tunnil í Føroyum. Ferðslan í tunnlinum er runt um 800 bilar um døgnið (samb. Landsverki). Nógv tung ferðsla koyrir ígjøgnum tunnilin hvønn dag. Teir stóru bilarnir eru allir serbygdir ella bilar, ið víkja frá standard málum á vanligum stórum bilum, ið koyra á landsvegnum í Føroyum. Tað kemur meira enn so fyri at farmur ikki sleppur gjøgnum tunnilin, hetta kemst av tí, at tað eru ikki bilar, ið ótarnaðir kunnu koyra við hesum farmi gjøgnum núverandi tunnil. Men eitt eru vit sloppin undan higartil, tað er at eingin vanlukka er hend í tunlinum, men tann dag, tá ein stór vanlukka hendir í tunlinum – tá verður ábyrgdin rættað móti viðkomandi ábyrgdara.

Tað er av alstórum týdningi, at nýggjur tunnil verður gjørdur sum skjótast millum Hvalba og Trongisvág. Byrjast má sum skjótast upp á hetta arbeiði. Tað er einki minni enn ein sjálvfylgja, at okkara 45 ára gamla farleið verður skift út við eina nýggja trygga og tíðarhóskandi farleið.

Minnist meg rætt, so er Hvalbiar Kommuna – einasta kommuna í landinum, ið hevur goldið stóran part í tunlunum, ið eru millum Hvalba og Trongisvág og Hvalba og Sandvík!

Eg skilji væl, at onnur eisini vilja hava ajourført teirra farleiðir, men lat tað verða eftir einum ávísum mynstri, ið tekur teir elstu tunlarnir fyrst. Einki annað er sjálvsagt.

Vónandi lesur onkur hetta, ið hevur, kann, vil og torir at siga eitt orð.

# ÍSLAND

*lag: Pat Woods: My Own Native Land*

Har ið snekkjur um útnorðurs boðabrot bógva,
stígur dreymoyggj úr havi; har ljómar hvør skor
fyri vársól av grønsku; sum tinnugrót glógva,
mælt um fljóð stolt sum kongaørn, skaldanna orð.

Reyð sum ástin, ið unghjún í skemmu man fevna,
spríkir eldglóð úr jøkli; sum drotninga brá
skyggja vøtn; fræls sum oknin, í lofti man stevna,
reisir ryggás og tekjuspír yrkjarans vrá.

Her tey verksmiðjur reistu við baki so fattum,
og her møðranna vøgguljóð signa hvørt barn
mundu vónrík; men trøllmenn av Angrboðu ættum
fløktu stjórnarar vitrar í sjónvillu-garn.

Og tey gandkelvi høgt yvir tívum og múgvu
hirdu trøllaljós Loka; av tingi burt vit
svann, og háborgir smullu, og barðlangt á grúgvu
fall mangt húski; um stund skiftu fæhirðar lit.

Mangan leik eigur tíðartalv; aftur skal rodna
moyarkinnin í skemmu, fyrr bleik eins og strá;
aftur fýsnið í unglingsins æðrum skal orna;
aftur run kyssa sjófar á fiskimiðs vág.

Eins og gler fyri nónsól skal gandurin bráðna
aftur grønka skal brekka og oyri og strond,
aftur svanur skal sveima um fjallkrúnu blána,
aftur vagga skal dreymoynni Alfaðirs hond.

***Hanus Kamban***

# Umbering til Meinhard Bjartalíð og lurtarar vegna skeiva sending í Kringvarpinum

ALLAN DALSGARÐ
Miðlaleiðari Kringvarp Føroya



Leygarkvøldið 11. oktober fór skeiv sending í luftina í útvarpinum. Talan var um, at ein skeivur partur í røðini "Hitt heilaga evangeliið skrivar", við Meinhardi Bjartalíð sóknarpresti, av misgávum varð sendur. Fleiri lurtarar hava gjørt okkum varug við hetta. Slík mistøk eiga ikki at koma fyri, og vit hava tikið neyðug stig til tess at forða fyri, at mistøk av hesum slagi ikki endurtaka seg. Samstundis vilja vit biða Meinhard Bjartalíð og allar lurtarar um umbering fyri mistakið.

**Gjald fyri valgreinar**

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru + MVG fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**